# Skemman klár til summarið




Hóast føroyska summarið kann verða stutt og svikaligt, so eru tað hóast alt nógvir góðir dagar at fegnast um, og tá ið sólin kagar fram, so gera føroyingar nógv burturúr. Skemman í Havn merkir eisini stóran áhuga fyri vørum, sum hava tilknýti til summarið. Skemman selir til dømis havamøblar, grillir, tjøld, køliboksir, soviposar og annað. - Vit hava úr at gera, tá sólin skínur. Føroyingar gera nógv meira burtur úr at tjalda og grilla, og tá summarið av álvara byrjar, so koma fólk at keypa ymsa summarútgerð, sigur Dan Hansen, stjóri í Skemmuni. Føroyingar eru farnir at tjalda nógv meira, enn teir hava gjørt, og hetta hevur serliga vundið upp á seg, síðani festivalarnir byrjaðu. Eisini er tað blivið meira vanligt, at føroyingar fara á kampingferð uttanlands, og tá skulu fólk eisini hava ymsa útgerð við. Og so er tað hugnaliga grillin, sum skal keypast, tá ið veðrið er til uttandura máltíðir, og her eru føroyingar eisini blivnir meira spentir í keypa stórar gassgrillir, sum veruliga kunnu breiða seg í sólini.



















